# Kommunufelag í Kvívík

**Skrivstovan hjá Føroya Kommunufelag flutti í fjør til Kvívíkar, og fríggjadagin 1. juni, í sól og góðum veðri, hevði felagið móttøku í nýggju hølunum fyri limunum og øðrum, sum hava samskifti við felagið**

MÓTTØKA

*Tekst/myndir: Sveiney Sverrisdóttir*

Fríggjadagin 1. juni hevði Føroya Kommunfelag móttøku í nýggju hølunum í Kvívík, har skrivstovan hjá felagnum flutti í fjør.

Í røðu sum Rósa Samuelsen formaður í felagnum helt fyri gestunum, greiddi hon frá viðurskiftunum viðvíkjandi felagshúsinum í Kvívík, sum vóru teknað av Palla Gregoriussen arkitekti fyri Sparikassan í sínari tíð. Neyðugt var at umbyggja húsini, fyri at nøkta tey krøv sum felagið setti, millum annað at brekað skulu kunna ferðast í bygningnum.

Felagið hevur fingið eitt gott fundarhøli, har stýrið heldur sínar fundir. Hølini hóska eisini væl til minni fundir fyri limunum.

Skrivstovuhølini eru innrættað sum opið umhvørvi, har tey tvey starvsfólkini hjá felagnum og starvsfólkið hjá "Agenda 21 Stovuni" halda til. At arbeiða í opnum umhvørvi dáma starvsfólkunum sera væl.

Felagið hevur gjørt avtalu um at seta eitt fólk í vart starv og royndarrtíðin byrjar innan summarfrítíðina.

Borgarstjórin í Kvívík, Boje Christensen, bjóðaði felagnum vælkomið til Kvívíkar og helt at felagið hevði valt ein góðan stað at hava sítt felagshøli. Kvívík liggur væl fyri landafrøðiliga, og hetta eigir at gera tað lætt hjá limunum at vitja felagið. Hann ynskti felagnum alt tað besta í framtíðini.



*Starvsfólkini hjá, Føroya Kommunufelag (FKF), Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum (KAF) Barnaverndarstovuni og Agenda 21 Stovuni, f.v.: Rósa Samuelsen, formaður í FKF, Marin á Brúnni, KAF, Bergmann Finnsson, Agenda 21 Stovan, Eyðun Christiansen, FKF, Anita KAF, Anna Dam, Hallbjørg Lamhauge og Jendis Gærdbo, Barnaverndarstovan og Sveiney Sverrisdóttir FKF*



*Føroya Kommunufelag og Agenda 21-stovan halda til í hesum bygninginum í Kvívík*



*Eyðun Christiansen, Bjarni Heinesen, skúlastjóri í Kvívík, Bárður Larsen og Bergmann Finnsson*



*Bergmann Finnsson á Agenda 21stovuni saman við pápanum Bjørn Finnsson, sum býr í Kvívík*



*Kommunupolitikarar nýta veðrið, f.v.: Júst Poulsen borgarstjóri í Hvannasunds Kommunu, Boje Christensen borgarstjóri í Kvívíkar Kommunu, Johan Christiansen, Leirvíkar Kommunu, Karl Olsen borgarstjóri Vestmanna Kommunu, Rósa Samuelsen, formaður FKF, Bergmann Finnsson Agenda 21 Stovan og Olaf á Stongunum, skrivari hjá Kvívíkar Kommunu*



*Regin á Lofti frá Sandavágs Kommunu og Asbjørn Djurhuus frá Sunda Kommunu*



*Poul Arni Jacobsen frá SEV, Boje Christensen, borgarstjóri í Kvívíkar Kommunu, og Jákup Suni Lauritsen borgarstjóri í Sørvágs Kommunu*



*Rósa Samuelsen, formaður í Føroya Kommunufelag og Boje Christensen, borgarstjóri í Kvívík*